# Hvør sum bara átti




**Tað er bæði við sorgblídni og lætta at Hjalmar og Tinna Petersen venda biðjandi barnaeygum, babydukkum og bangarum bakið**

HANDILSMYND
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Sum barn droymdi eg um, at mamma skuldi gloyma meg eftir hjá Hjalmari. So kundi eg vera innilæst har eina heila nátt púra einsamøll og blíva eftirlýst av politinum í útvarpinum. Og tá starvsfólkini komu til arbeiðis morgunin eftir, lá eg og svav á gólvinum millum rúgvur av upplætnum leikutoyi, sum eg hevði spælt við.

Hetta var ein góður dreymur, tí hvør sum bara átti ein leikutoyshandil – akkurát sum Hjalmar. Men skjótt eigur Hjalmar ongan Hjalmar meir, tí "Guli Bókahandil" letur aftur og er settur á sølulistan. Fyri eigararnar óivað ein røtt avgerð, men fyri kundarnar ein dáragerð, tí fáir handlar eru so sjálvskrivaðir í býarmyndini sum bókahandilin við ljóskurvarnar í Miðbýnum í Havn.

## Miðbýarlív

- Vit vóna sjálvandi, at onkur uppfinnsamur persónur keypir handilin við tí fyri eygað at skapa lív í miðbýin, siga tey bæði Hjalmar Petersen (64) og konan Tinna Petersen (58), nú vit sita uppi í erva í gula húsinum; í íbúðini har mamma Hjalmar, Margretha, búði. Her sita vit nú - hendan vakra summardagin í Havn; í friðarliga kvistinum oman móti Steinatúni. Jú, hetta er avgjørt besta útsýnið fyri eina inkarneraða havnardamu, hugsi eg, meðan eyguni fylgja trokandi bilum og bussum, stórum skúlataskum við smáum skúlabørnum og trillandi barnavognum við mammum í mai. Her sat Margrehta eisini og kikaði, líka til tað síðsta. Longu áðrenn hon doyði í september í fjør var avrátt, at tá hon var farin, skuldi handilin og húsið seljast.

- Fyri okkum er tað bæði við sorgblídni og við lætta, at vit gevast. Vit orka ikki at halda fram. Tað er so strævið og bundisligt at reka handil, og tungt at fáa tað at mæla runt, sigur Hjalmar, sum, hóast hann er útlærdur timburmaður, hevur staðið í handlinum í 40 ár. Hann og Tinna eiga vaksin børn, sum ikki hava hug at taka við. So her í 2008 endar søgan um bókahandilin hjá Hjalmar Jacobsen, ið Hjalmar Petersen og systkini hava rikið sum triðja ættarlið. Í bókini hjá Birgari Johannesen, "Havnin – fólk og yrki", verður greitt frá, at gamli Hjalmar Jacobsen, bókbindarin, lat bókahandil upp longu í 1914. Tann 17. juli 1918, sama dag sum